Bjørg Hentze

Fra: Andreas Sjóvará
Sendt: 14. februar 2023 13:46
Til: Fíggjarmálaráðið
Cc: Turid Arge; Jan Simonsen; Marjun Jacobsen
Emne: Hoyringarsvar frá Heilsumálaráðnum o.o. til uppskot til løgtingslóg um Mínboks
Vedhæftede filer: 21_07135-4 Uppskot til løgtingslóg um Mínboks 1117133_1_0 (2).DOCX; Hoyringssvar til uppskot til løgtingslóg um Mínboks - Etiska ráðið.docx; SV: Hoyring - Uppskot til løgtingslóg um Mínboks ; SV: Hoyring - Uppskot til løgtingslóg um Mínboks

Góðan dagin

Sambært avtalu verður hoyringarsvarið hjá Heilsumálaráðnum til uppskot til løgtingslóg um Mínboks sent Fíggjarmálaráðnum í dag.

Heilsumálaráðið takkar fyri høvið at gera viðmerkingar til uppskotið um løgtingslóg um Mínboks.

Umframt viðmerkingarnar hjá Heilsumálaráðnum niðanfyri, sí eisini hoyringarskriv frá Landssjúkrahúsinum, Etiska ráðnum og Vísindasiðsemisnevndini, ið eru viðheft.

Hoyring - uppskot til løgtingslóg um Mínboks

Kommunulæknar eru alment settir og fevndir av fyristingarlógini. Heilsumálaráðið skilur lógaruppskotið soleiðis, at kommunulæknar tí eru fevndir av § 2, nr. 5 í lógaruppskotinum. Sambært løgtingslóg nr. 28 frá 23. apríl 1999 um kommunulæknaskipan setur Heilsutrygd kommunulæknar í starv, t.v.s., at teir eru alment sett starvsfólk. Heilsutrygd kann í serligum førum seta starvsfólk í starv í læknaviðtaluhølunum, talan er aloftast um starvsfólk í viðtalum, sum ikki eru mannaðar við einum kommunulækna í føstum starvi. Tá tað snýr seg um viðtaluhølir bera kommunurnar útreiðslurnar av rakstri og viðlíkahaldi av hølum, innbúgvi, tólum og amboðum. Kommunulæknar gera roknskap fyri viðtaluna, teir starvast í. Kommunulæknaviðtalurnar hava ikki egin stovnsnummur. Tað eru 34 kommunulæknaviðtalur, og sambært uppskotinum til fíggjarlóg fyri 2023 er ætlanin at stovna tríggjar kommunulæknaviðtalur afturat. Sambært lógaruppskotinum verður eingangsgjaldið fyri at knýta seg í Mínboks 16.000 kr. Fyri tær 34 kommunulæknaviðtalurnar svarar hetta til ein samlaðan kostna á 544.000 kr. Fyri 37 kommunulæknaviðtalur verður samlaði kostnaðurin 592.000 kr. Haraftrat koma útreiðslur til nýtslugjald fyri hvørt bræv, ið verður sent ella móttikið. Hesum kann Heilsumálaráðið ikki taka undir við.

Heilsumálaráðið skal harumframt vísa á, at gjøld, so sum nýtslugjøld, eiga at hava heimild í løgtingslóg vísandi til 3.5. skattir, avgjøld og gjøld í rundskriv um lógarsmíð. Heilsumálaráðið heldur, at ein áseting um gjald eigur at setast í lógaruppskotið, undir hesum at gjaldið verður prístalsjavnað. Heilsumálaráðið skal eisini vísa á, at gjaldið ikki eigur vera hægri enn útreiðslurnar, sum eru av virkseminum at knýta almennir stovnar ella løgfrøðiligir persónar í Mínboks.

Uppskotið leggur upp til, at tað er sjálvboðið hjá likamligum persónum at tekna seg til Mínboks. Harumframt leggur uppskotið upp til, at almennir myndugleikar skulu samskifta umvegis Mínboks í ávísum førum í samsvari við grein 3, stk. 2. Víst verður á, at tá ein likamligur persónur ikki er teknaður til Mínboks, hevur ein almennur myndugleiki ikki møguleika at samskifta umvegis Mínboks við persónin. Er ætlanin í tílíkum støðum, at almenni myndugleikin skal nýta vanligan post, og ikki teldupost, verður mælt til at hetta gerst greitt í uppskotinum.

Uppskotið leggur upp til, at upplýsingar, sendar í Mínboks roknast sum komnar fram, ta løtu upplýsingarnar eru atkomandi fyri móttakaran. Hetta kann føra við sær, at ávísir samfelagsbólkar, til dømis eldri fólk ella útlendingar, ið ikki eru sterk innan talgilda heimin ella føroysk viðurskifti, missa rættin at kæra ella annað grundað á, at tey ikki hava sæð boðini í Mínboks. Í løtuni er sum skilst gjørligt at fáa ein teldupost, ið ger vart við at persónurin hevur móttikið eitt bræv í Mínboks. Skotið verður upp at hendan tænastan verður víðkað til eisini at fevna um SMS-boð, um talan er um boð, ið persónurin skal svara uppá innan ávísa freist.

Víst verður á, at orðið "brúkarir" ikki verður nýtt við eintýddari merking allan vegin gjøgnum uppskotið. Í yvirskriftini omanfyri grein 3 verður orðið nýtt sum eina tilvísing til aktørarnar í §§ 3-4, tað er almennir stovnar og likamligir og løgfrøðiligir persónar. Aðra staðni í uppskotinum verður orðið nýtt sum eitt samheitið við likamligar persónar. Til dømis "Tað er ókeypis hjá brúkaranum at nýta Mínboks." Mælt verður til, at orðið brúkarir verður nýtt við einari merking í øllum uppskotinum.

Tað framgongur av uppskotinum, at Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu nýtir Mínboks. Víst verður á, at stovnurin er avtikin og fluttur undir Fólkaheilsustýrið, Landssjúkrahúsið og Granskingareindina tann 1. januar 2023.

Sagt verður frá hesum.

Vinaliga/Sincerely

Andreas Sjóvará

Fulltrúi/Head of Section

Heilsumálaráðið / Ministry of Health
Eirargarður 2 • 100 Tórshavn • Faroe Islands
Tel. +298 304050 • Mobile +298 734015
andreas.sjovara@hmr.fo • www.hmr.fo

Fra: Marjun Jacobsen <Marjun@fmr.fo>
Sendt: 16. januar 2023 16:19
Til: Journalin hjá LMS <journalin@tinganes.fo>; VMR-Journal <uvmr-journal@uvmr.fo>; Mentamálaráðið <ummr@ummr.fo>; Fiskimálaráðið Journal <fisk@fisk.fo>; Heilsumálaráðið <hmr@hmr.fo>; Almannamálaráðið <amr@amr.fo>; industry@industry.fo; AV Almannaverkið <av@av.fo>; Akstovan <Akstovan@akstovan.fo>; alzheimer@alzheimer.fo; samstarv@samstarv.org; megd@megd.fo; politi@politi.fo; kf@kf.fo; Kundatænastan á TAKS <taks@taks.fo>; Gjaldstovan <gjaldstovan@gjaldstovan.fo>; Strandfaraskip Landsins <ssl@ssl.fo>; Dátueftirlitið <dat@dat.fo>; ft@ft.fo; sev@sev.fo; Fjarskiftiseftirlitið <fjarskiftiseftirlitid@fjarskiftiseftirlitid.fo>; Skráseting <skr@skraseting.fo>; us <us@us.fo>
Emne: Hoyring - Uppskot til løgtingslóg um Mínboks

Góðan dag,

Fíggjarmálaráðið hevur í dag sent uppskot til løgtingslóg um Mínboks í almenna hoyring.

Mínboks hevur meiri enn 10 ár á baki og lýkur krøv um trygt talgilt samskifti, eisini í mun til dáturverndarlógina. Gjaldstovan yvirtók Mínboks í 2018 í sambandi við arbeiðið hjá Talgildu Føroyum og er Mínboks í dag ein sameindur partur av Vanganum. Mínboks lýkur ásetingar og standardar um talgilda atkomu, sum tryggjar, at so nógv sum møguligt fáa atgongd til postkassan.

Postur sum í dag verður sendur gjøgnum talgildu skipanina hevur tó ikki somu rættarligu støðu sum postur, ið verður sendur við pappíri og brævbjálva. Endamálið við lógaruppskotinum er at javnseta "vanligan" post við talgildan post, soleiðis at t.d. kunning millum stovn og borgara hevur somu rættarligu støðu, óansæð um hendan kunningin er talgild við Mínboks ella ikki. Lógarbroytingin er ein liður í arbeiðinum at gera samskiftið millum almennar stovnar og borgarar meira tíðarhóskandi og smidligt.

Borgarar skulu trygt kunna samskifta talgilt við almennar stovnar. Tí verður ásett sum krav, at almennir stovnar skulu samskifta umvegis Mínboks, tá ið viðkvæmar persónsupplýsingar ella trúnaðarupplýsingar verða sendir talgilt. Tað ber framhaldandi eisini til at senda slíkar upplýsingar við vanligum posti.

Fyri at rita inn á Mínboks, skulu borgarar hava Samleikan. Borgarar yvir 13 ár kunnu fáa Samleikan. Í dag eru 33.700 fólk eru skrásett sum brúkarar í Mínboks.

Uppskotið er til hoyringar á hoyringsportalinum hjá Landsstýrinum fram til 13. februar 2023 og møguligar viðmerkingar skulu sendast til fmr@fmr.fo í seinasta lagi 13. februar 2023.

Vinarliga / Kind regards

Marjun Jacobsen
fulltrúi
Fíggjarmálaráðið/ Ministry of Finance
☏: direct: +298 55 20 04
marjun@fmr.fo